## Føroyingar til karaoke kapping í Finnlandi

Í morgin fer eitt føroyskt ferðalið til Finlands, har tey skulu taka lut í Karaoke World Championship. - Hendan lutøkan hevur Glitnir fingið í lag saman við KWC í Finlandi, sigur Hans Andreasen, stjóri í Glitni. Hann sigur, at eini 36 lond fara at at taka lut fríggjakvøldið og leygarkvøldið í Lahti í Finlandi. Tað verða tvey umboð fyri Føroyar, tað vóru tey, ið vunnu FM heitið í Karaoke2009. Anita Ottosen fyri tað kvinnuliga karaoke og Bjarki Hansen fyri tað mannuliga karaoke. Tað ber eisinit til at síggja hetta beinleiðis á telduni við at fara inn á www.karaoke.fo




## Merkel við umbering

Týski kanslarin, Angela Merkel, bað í gjár afghanska fólkið um umbering fyri tilburðin, tá NATO-flogfør bumbaðu tveir tangabilar har norðuri í Afghanistan við tí úrsliti, at tíggjutals sivilfólk lógu eftirá. Orsøkin til umberingina frá kanslaranum var, at tað vóru týskir NATO-hermenn, sum bóðu flogførini um hjálp, tí Taliban hevði tikið teir báðar tangabilarnar. Angela Merkel legði kortini áherslu á, at teir týsku hermenninir í Afghanistan gera eitt gott og neyðugt arbeiði har. - Men eg harmist um hvørt einasta mannalív, sum ferst, segði hon.

# Arbeiðsfólk hugnaðu sær í Týsklandi



**Sjeynda árið á rað hevur Tavan í Leirvík bjóðað sínum arbeiðsfólki á eina uttanlandsferð. Vanligt hevur verið, at fólk fara í summarfrí, tá gulllaksavertíðin er av og lagt verður um til upsaframleiðslu. Í ár bjóðaði Tavan sínum arbeiðsfólki eina fimm dagar langa ferð í Týsklandi**

ÚTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Mikkjal Hans Andreasen*

Arbeiðsfólkið á Tavuni hevur enn einaferð verið uttanlands í summarfrí. Hetta er sjeynda árið á rað, at virkið í Leirvík bjóðar sínum arbeiðsfólki uttanlands – í skiftinum um heystið millum gulllaks og upsa.

Eitt sindur ymiskt er ár undan ári, nær virkið gevst við gulllaksavirkseminum, men tá ið august mánaði fer at halla, plagar at líða móti endanum.

Gulllaksavertíðin byrjar vanliga seint um várið, og í vertíðini fiska seks skip gulllaks, harav Tavan at kalla burtur av keypir fiskin hjá trimum av hesum skipum.

Meðan Tavan virkar gulllaks, er rættiliga nógv og støðugt arbeiði á virkinum, sum í hesum tíðarskeiði er í gongd einar 20 tímar um samdøgnið og vanliga í seks dagar um vikuna.

Arbeitt verður frá klokkan 06-16 og frá klokkan 16-02, ofta eisini leygardagar.

### Stórur helmingur

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni, sigur, at tað hevur verið eitt sindur ymiskt, hvussu nógv arbeiðsfólk plaga at verða við á árligu ferðunum uttanlands, men vanligt er, at størri helmingurin er við.

- Samlaða talið av arbeiðsfólki á Tavuni liggur nær seksti, tá øll eru tald við, og á ferðini hesaferð vóru vit eini 30 fólk. Onkur pør arbeiða á virkinum, men annars er hetta ikki ein túrur við maka. Tað eru bert arbeiðsfólkini, sum eru við á hesum ferðum, sigur hann.

Ferðalagið fór úr Føroyum við Norrønu fríggjadagin 28. august, og úr Esbjerg koyrdu tey í bussi til Rüdesheim í Týsklandi, sum liggur við Rhínánna og beint vestanfyri Frankfurt.

- Vit steðgaðu í Týsklandi í fimm dagar. Veðrið var gott. Vit høvdu sól, og hitin lá millum eini 20 og 30 stig.

Stjórin, sum sjálvur var við á ferðini, sigur, at tey vóru onkrar útferðir í Týsklandi, og eitt nú sigldu tey eftir Rhínánni, eins og tey vitjaðu elsta býin í landinum, Trier, sum liggur nær markinum til Luxemburd. Busstúrurin úr Rüdesheim til Trier tók einar tveir tímar.

- Í Trier, har eini 100.000 fólk búgva, vitjaðu vit eitt nú onkrar gamlar bygningar frá rómverjatíðini, sigur Jóan Magnus Rasmussen.

### Ferðin uppiborin

Stjórin heldur, at fólk sum heild hava verið fegin um tær uttanlandsferðir, sum Tavan hevur skipað fyri, og soleiðis var eisini hesaferð.

- Vit rinda fyri ferð og uppihald, og vit halda, at arbeiðsfólk hava hesar ferðir væl uppibornar. Nógv arbeiði er á Tavuni í summarmánaðunum. Vaktirnar eru langar, og vikan somuleiðis. Tey allarflestu fara soleiðis ikki í summarfrí, fyrr enn vit eru liðug við gulllaksin. Eg haldi, at ein fittur partur av fólkinum sær fram til hesar ferðir, sum vit hesi árini hava gjørt í skiftinum millum gulllaks og upsa.

Jóan Magnus leggur dent á, at tey eru sera væl nøgd við tey arbeiðsfólk, sum eru knýtt at virkseminum hjá Tavuni.

- Av teimum út við seksti fólkunum, sum eru í starvi hjá felagnum, eru nú at kalla bara føroyingar og onkur einstakur útlendingur, leggur hann aftrat.

### Fólk ringja

Stjórin vísir á, at soleiðis, sum støðan í samfelagnum er broytt seinasta árið, hevur tað gingið væl hjá leiðsluni at manna virkið.



*Stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen, sigur, uttanlandsferðin er væl uppiborin, og hann heldur, at fólk síggja fram til hesa á hvørjum ári*



*Býarportrið til Trier, elsta bý Týsklands, har ferðalagið eisini vitjaði*